


# STARVSFÓLK TIL NÝGGJU MYLNUNA

## Í Jónas Broncksgøtu

Søkt verður eftir starvsfólki at arbeiða í Mylnuni í J. Broncksgøtu. Vit søkja eftir fólki at arbeiða fulla tíð, skiftandi tíðir. So ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði, við nógvum starvsfólkum. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.

Vit gleða okkum at hoyra frá tær…

**SEND UMSÓKNINA TIL:**

Mylnan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn ella send ein teldupost til mylnan@sms.fo

mylnan

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# Almannastovan søkir KT-starvsfólk til Vitanardeildina

Tú verður partur av einum stovni, ið alla tíðina lagar seg eftir broytingum í samfelagnum og tekur við avbjóðingunum, sum liggja í framtíðini.

Í sambandi við at Almannastovan í næstum fer undir ta størstu almennu KT-verkætlanina nakrantíð í Føroyum, verður søkt eftir KT-starvsfólki til Vitanardeildina á Almannastovuni. Til fyrra part av KT-verkætlanini - ið væntandi fer at fevna yvir tvey ár - eru játtaðar 15 milliónir krónur. Eftir ætlan verður farið undir seinna part í 2009/2010, ið somuleiðis væntast fevna yvir tvey ár.

Sum KT-starvsfólk verður tú partur av einum KT-bólki, sum komandi tíðina kemur at arbeiða við kravfesting, prosessoptimering, design o.ø. Umframt hetta kemur tú at taka lut í øðrum uppgávum á Vitanardeildini. Hesar uppgávur fevna m.a. um:

- Samanseting av Intraneti og heimasíðu
- Viðlíkahald av KT-undirstøðukervi, allari telduútgerð, ávísum serskipanum og brúkaraforritum
- Samskifti við veitarar
- Umsiting av KT-trygdararbeiði
- Lisensumsiting
- Brúkarastuðul
- At orða og skipa mannagongdir á KT-økinum

Søkt verður eftir fólki við KT-útbúgving frá hægri lærustovni, aðrari líknandi KT-útbúgving, ella drúgvum og viðkomandi royndum við KT-ella verkætlanar arbeiði. Í sambandi við nýggju KT-verkætlanina er tað ein fyrimunur, um tú hevur útbúgving ella royndir innan kravfesting og annars analysuarbeiði sum heild innan KT-verkætlanir.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Frankie Jensen, leiðara á Vitanardeildini, á telefon 35 35 10 ella 21 54 56.

Skrivlig umsókn við CV, prógvum v.m. skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 28. august 2007 kl. 12.00.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postrúm 3096,
110 Tórshavn.